# – Eitt heppið hús



- Hetta var jú eitt "mirakuløst projekt". Og eingin visti, um tað nakrantíð bleiv til nakað, sigur Cold, sum eisini fegnast um stuðul, sum feløg, stovnar og kommunur vístu ætlanini, tá ferðast var í Føroyum, sigur Steen A. Cold

**Hetta sigur fyrsti leiðarin í Norðurlandahúsinum, Steen A. Cold, sum við gleði minnist aftur á dagarnar, tá húsið varð tikið í nýtslu og kom í gongd, men eisini var hann við í allari gongdini viðvíkjandi húsinium, frá hugsan til veruleika**

NORÐURLANDAHÚSIÐ 20 ÁR
*Dagfinn Olsen*

Steen A. Cold var við allan vegin, tá hugsanin og varisligu royndirnar byrjaðu, ið seinni fostraðu næststørstu ætlan í norðurlendskum mentanaramstarvi nakrantíð, nevniliga Norðurlandahúsið í Føroyum. Tann størsta var Nordsat, ein sjónvarpsfylgisveinur, men hetta datt niðurfyri.

## Mirakuløst projekt

Men hvussu minnist Steen A. Cold afturá tíðina, áðrenn ætlanin gjørdist veruleiki og eisini tíðina sum stjóri í Føroyum.

- Við takksemi og eg hugsi afturá við gleði, sigur Cold.

Hann var við í norðurlendskum arbeiðsbólki, sum skuldi fyrireika húsið, føroysk umboð sótu eisini í bólkinum. Serfrøðingur úr Ungarn var eisini í myndini og vitjað varð í ymsum mentanarhúsum.

- Hetta var jú eitt "mirakuløst projekt". Og eingin visti, um tað nakrantíð bleiv til nakað, sigur Cold, sum eisini fegnast um stuðul, sum feløg, stovnar og kommunur vístu ætlanini, tá ferðast var í Føroyum.

- Tað skuldi entusiasma og mót til at fáa ætlanina í lag, og har eigur Dánjal Pauli Danielsen at nevnast, bóndi í Búðini á Velbastað, og táverandi politikari, ið gekk á odda í stríðnum fyri at vinna hugsanini um Norðurlandahúsið frama.

## Ikki bert skúlatalur, men framtíðarætlanir

- Húsið, ætlanin. Tað var jú mest hugtakandi, tá tað ikki var har, tí síðani kom gerandisdagurin jú, hugleiðir



*Steen A. Cold var fyrsti stjóri í Norðurlandahúsinum*

Cold um tunga burðin viðvíkjandi Norðurlandahúsinum.

Og hann nevnir fleiri persónar, sum í dag meira og minni standa skrivaðir í gloymibókini, men vert er at hugsa um, at tað var Ellintur Patursson, sum fostraði hugsanina og legði uppskot fyri Norðurlandaráðið um opera- og konsertsal í Føroyum. Sviin Jan Stjarnstedt, svenskur undirvísingarstjóri, legði eisini nógva orku í og eigur sín lut í ætlanini.

- Tað gjørdust somu fólk, sum lótu húsið byggja, sum lótu húsið upp. Tað er jú syrgiligt, um ein bara segði, at hetta var tað og nú má tað sigla sín egna sjógv, sigur Cold.

Hann er samdur í, at tað hevur gingið væl og eisini at hugburðurin er broyttur frá tí, at húsið er staðið har bara ávís - "tey fínu" - hittast.

- Hinvegin er vert at leggja sær í geyma hugsjónina, at húsið ikki skal gerast sum eitt hvørt bygdahús, har fólk koma uttan nakra miðvísa ætlan, endurgevur Cold ein norskan ráðharra.

- Tað varð nógv hugsað tá, og tað eigur ein ikki at gloyma, tí einki verður til av sær sjálvum, sigur Cold um væl eydnaðu ætlanina, Norðurlandahúsið, sum er eindømi og sum nú verður 20 ár.

Hann fegnast um góðu ummælini, sum húsið javnan fær, t.d. fyri ljóðviðurskifti.

- Ja, nógv góð fólk vóru inni í myndini, tað var næstan so, at tað besta var ikki nóg gott. Fólk søgdu eisini tá, at um tað var so gott, hví so ikki leggja tað í Keypmannahavn?

- Eg hugsi aftur á við gleði. Og eg vóni, at nú 20 ár eru liðin, so verður høvið nýtt til at klárleggja framtíðarætlanirnar. Vónandi verða ikki bert vanligar skúlatalur at hoyra, hóast tað altíð er stuttligast at bara koma og hoyra eitt kór syngja og so framvegis, sigur Steen A. Cold.

## Ræður um at skapa eitt hugtak

Og hann váttar, at Norðurlandahúsið so avgjørt er ein varði, tá tað snýr seg um avrik hansara.

- Tað er ein varði í mínum virksemi, Tað er eitt heppi hús. Men vit eiga ikki at gloyma undangongumenninar, t.d. Ellint Patursson, sigur Steen A. Cold, sjálvur partur av undangonguliðnum.

Og meira ella minni í trúnaði og við farra av skemti greiðir hann frá, at eingin nakrantíð trúði uppá, at hetta gjørdist veruleiki, men tað vóru kreftir, sum arbeiddu hart, m.a. áðurnevndi svenskí undirvísingarstjórin.

- Og so vóru tað jú vit onnur, embætisfólkini. Ein segði við okkum, at vit kundu ikki taka avgerðir, men vit kundu ávirka. Um t.d. málið kom nóg ofta á dagsskrá, so kom tað einaferð til viðgerðar. Og so við og við, so skapar ein eisini eitt hugtak, sum fólk, politikarar, fáa áhuga í og tey spyrja, hvussu tað nú er við hasi ætlanini, hugleiðir Steen A. Cold, sum fegnast um at hava fingið høvi at koma til Føroya nakrar ferðir, eftir stjóratíð sína fyri 20 árum síðani.

Cold skrivar í dag bøkur og undirvísur, eftir at vera farin frá sum mentanarstjóri í Keypmannahavn og leiðari við Kulturby '96 ætlanina.

- Norðurlandahúsið lærdi meg nógv, sigur Steen A. Cold.



# Norðurlandahúsið fyri øll

**Norðurlandahúsið skal bjóða smala og breiða, nýskapandi og siðbundna mentan, sigur stjórin Helga Hjörvar.**

NORÐURLANDAHÚSIÐ 20 ÁR
*Rigmor Dam*



*- Norðurlandahúsið skal vera fyri øll, ung sum gomul, smala og breiða mentan, sigur Helgu Hjörvar*

Vit hava sett stjóranum í Norðurlandahúsinum, íslendsku Helgu Hjörvar, stevnu á ljósu skrivstovu hennara, í óalmenna partinum av húsinum, fyri at líta aftur um bak og práta um tær avbjóðingar, sum liggja fyri framman, nú Norðurlandahúsið hevur 20 ára hátíðarhald.

Helga, sum er sætti stjórin, sum hevur verið í Norðurlandahúsinum, tók við starvinum 1. februar 1999, og kom tá úr einum starvi sum stjóri fyri stovnin Teater og Dans i Norden.

- Tað er so stuttligt at síggja alt, sum fer fram á mentanarliga pallinum í Føroyum, sigur hon hjartaliga, longu áðrenn hon verður spurd. Og hetta er tað, sum eyðkennir hana undir allari samrøðuni, ein innilig gleði um at verða mitt í meldrinum av tiltøkum, hugskotum, íblástri og uppgávum.

- Húsið er ein víður og góður karmur, her er vakurt og møguleikarnir fyri at skapa eitt fjøltáttað og nútímans mentanarlív eru so avgjørt til staðar, sigur hon, og vísir til endamálið við húsinum, sum av fyrstan tíð var at fáa norðurlendska mentan til Føroyar, og at fáa føroyska mentan til onnur norðurlond, og at stuðla føroyskari mentan. So, umframt at skapa karmar fyri hesum endamálið, heldur Helga Hjörvar tað vera eina stóra persónliga avbjóðing, bæði at hava listarligu og fíggjarligu ábyrgdina av húsinum, umframt alt tað praktiska, sum sjálvsagt altíð skal vera í lagi.

- Norðurlandahúsið skal vera fyri øll, ung sum gomul, smala og breiða mentan. Nýskapandi og siðbundna mentan og fjølbroytt tiltøk, sigur hon, og nevnir tey seinastu stóru tiltøkini, sum hava verið, so sum Ung í Føroyum, Prix Føroyar og Listastevnuna, har okkurt hevur verið til allar aldursbólkar og áhugamál.

## Vinnulívið við

Næsta uppgávan hjá húsinum verður í størri mun at fáa onnur uppí at draga línuna saman við Norðurlandahúsinum. Hetta kundi verið eitt nú vinnulívið og ymiskir grunnar, sigur hon, og greiðir frá, at tá tiltøkini gerast størri og kravmiklari, verður alt torførari hjá húsinum at standa fyri øllum.

- Tí vit eru bara karmurin, og hann hevur sjálvsagt nógv at siga. Men tá tú skal fylla salin við 400 áskoðarum, so setir tað eisini stór krøv til fyrireikararnar, um at vera professionellir og alla tíðina at koma við onkrum nýggjum. Tí fólk vænta sær givið meira í dag, enn tey gjørdu fyri fáum árum síðani. Og har skulu vit alla tíðina kunna bjóða nýskapandi list og mentan. Tí geva vit eisini nógv rúm fyri slíkum, sigur Helga.

## Ein møguleiki heldur enn koddi

Tá Norðurlandahúsið kom á sinni vóru nógv, sum fryktaðu, at tað fór at vera ein koddi fyri føroyskt mentanarlív, og at stigtakan, ábyrgd og peningalig játtan, alt fór at verða latið upp í hendurnar á stórum norðurlendskum stovnum.

Nú vit í dag líta aftur um bak, sigur Helga Hjörvar, at vit tíbetur kunnu staðfesta, at húsið heldur hevur verið ein møguleiki enn ein koddi hjá føroyskari mentan.

- Býtið er soleiðis í dag, at landið letur sítt íkast til mentanina, eitt nú gjøgnum Mentunnargrunn Løgtingsins, eins og at Tórshavnar Byråd letur, meðan vit kunnu bjóða sjálvan pallin. Hetta haldi eg verða eitt gott ábyrgdarbýti, politiskt sæð, sigur Helga Hjörvar, sum heldur ikki sær húsið sum ein kodda hjá ymsu skapandi og útinnandi listargreinunum.

- Tí hvørgan myndlistin ella leiklistin eru bundin at Norðurlandahúsinum, men hava egnar karmar við Listaskálanum og Meiarínum. So hesi økið hava ment seg sera nógv, hóast Norðurlandahúsið hevur verið her, meðan klassiski tónleikurin enn er bundin at húsinum, við Symfoniorkestrinum á odda, sigur Helga Hjörvar.

- Tann listargreinin, sum Helga metir vera ringast fyri í dag, er livandi tónleikurin, har tørvur avgjørt er á einum tónleikahúsið nærri miðbýnum, til jazz, fólka og rocktónleik, har loyvi er at skeinkja.

- Alt gott um Norðurlandahúsið, men tað er hóskar ikki til hugnaligar ella villar standikonsertir, tí umstøðurnar her eru nakað formellar og seta ein demppara á slík tiltøk, sigur Helga Hjörvar, sum ikki ivast í, at eitt slíkt hús verður veruleiki innan fá ár.

## Av og á bygd

Norðurlandahúsið er ikki einans ein pallur, men eins nógv ein stovnur sum eigur at stuðla á nógvum ymsum økjum og í øllum landinum. Tí er Helga Hjörvar eisini sera spent uppá framtíðar samstarvið við aðrar mentanarstovnar í Føroyum og nevnir hon eitt nú virksemið hjá Mentunnarhúsinum í Fuglafirði, sum ein sjálvsagdan samstarvsfelaga, tí, sum hon sigur, tað skal vera eins lokkandi at fara á bygd, sum av bygd.

# Hyggja aftur og fram

**20 ár eru liðin, so vert er at hyggja aftur og fram. Hetta er ætlar nýggi stýrisformaðurin fyri Norðurlandahúsið, Helvinn Høst, sum er hálvur føroyingur. Men eisini ætlar hann at mæla til eitt ment útnorðursamstarv**

NORÐURLANDAHÚSIÐ 20 ÁR
*Dagfinn Olsen*



*Helvinn Høst er formaður í stýrinum fyri Norðurlandahúsinum*

Karin Kjølbro er farin frá, eftir at hava sitið sum einasti føroyski stýrisformaður í stýrinum fyri Norðurlandahúsið. Men í hennara stað er hálvi føroyingurin Helvinn Høst komin.

- Stýrið velur sjálvt formannin, sum situr í tvey ár í senn. Eg hevði sitið longst í stýrinum, so tað var nokkso náttúrligt, at eg tók við sum formaður, sigur Helvinn Høst, sum hevur pápa úr Hvalba og sum hevur verið nógv í Føroyum. Gerandisstarv sítt hevur hann í danska mentamálaráðnum.

- Saman við leiðsluni, so leiðir stýrisformaðurin fundirnar. Men annars hevur stýrið ábyrgd av húsinum yvirfyri Norðurlandaráðnum, bæði fíggjarliga og á annan hátt, so vit fylgja væl við, sigur Helvinn Høst.

## Ment útnorðursamstarv

Helvinn Høst verður við til 20 ára haldið fyri Norðurlandahúsið og skal flyta fram røðu. Men hvussu sær stýrisformaðurin framtíðina?

- Eg ætli at tala fyri einum mentum útnorðursamstarvi. Tað er gott samstarv við Ísland og Grønland í dag og eigur hetta at mennast. Og eisini eiga vit at byggja meira á tey sambond, vit hava fingið við t.d. Hetland og Írland, sigur Helvin Høst, sum í røðu síni ætlar at hyggja aftureftir, men eisini frameftir.